Dagf. 21. juni 2022
HMR j. nr. 22/11302-4

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-209/2021 eftir § 52 a í tingskipanini um endurvenjingar frá Helga Abrahamsen, løgtingsmanni

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Bjóða allar privatar sjúkratryggingar sjúklingunum endurvenjing, um hetta verður mett neyðugt?

2. Fá allir sjúklingar, sum hava fingið viðgerð aðrastaðni enn í føroyska heilsuverkinum, og sum hava tørv á endurvenjing, men sum av eini ella aðrari orsøk ikki fáa tilboð um hetta frá síni trygging, tilboð um endurvenjing frá heilsuverkinum?

3. Hvussu verða sjúklingarnir kunnaðir um hetta?

Svar:

Til spurning 1
Landsstýrismaðurin varðar ikki av, og hevur ei heldur kunnleika til innihaldið í øllum teimum privatu sjúkratryggingunum, sum verða teknaðar. Tað er eitt mál millum tann tryggjaða og tryggingarfelagið.

Men sum víst varð á í áður givna svari, eru fleiri, sum hava endurvenjing sum ein part av sjúkratryggingini.

Til spurning 2 og 3

Hava sjúklingar fingið viðgerð aðrastaðni enn í føroyska heilsuverkinum ella umvegis heilsuverkið, kunnu hesi venda sær til kommunulæknan í sambandi við møguligan tørv á endurvenjing. Metir kommunulæknin, at sjúklingurin hevur tørv á endurvenjing frá Sjúkrahúsverkinum, skal ein ávísing frá

kommunulæknanum sendast Sjúkrahúsverkinum. Fær Sjúkrahúsverkið fyrispurning um endurvenjing frá sjúklingi, ið eru viðgjørdir privat, uttan at sjúklingurin er ávístur frá Sjúkrahúsverkinum, so kunna tey sjúklingin um, at ein ávísing er neyðug.

Flestu hava tó møguleikan at fáa endurvenjingina frá privatari klinikk við ávísing frá kommunulækna.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin, reisir spyrjarin spurningin um, hvør orsøkin er til, at fólk, ið fáa skurðviðgerð aðrastaðni enn í føroyska heilsuverkinum, missa rættin til endurvenjing í heilsuverkinum. Tað er ikki rætt, at tey missa rættin, men tey skulu ávísast rætta vegin.

Sambært Sjúkrahúsverkinum hava tey onki kærumál um manglandi endurvenjing í Sjúkrahúsverkinum vegna skurðviðgerð aðrastaðni.

Heilsumálaráðið, 21. juni 2022

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður